skemt



# Fysioterapeuturin spardi seg

Tað var ikki hissini uppgáva, sum danski fysioterapeuturin hjá hondbóltskvinnunum hevði á Cypros. Við 15 spælarum, sum meira ella minni vóru fyrilagstar eftir eina strævna dystarskrá, var tørvurin á viðgerð ógjørligur at nøkta hjá einum einsamøllum fysioterapeuti. Ráðaleys var Tina Jacobsen tó á ongan hátt. Her hevur hon sett allar spælararnar í eina langa røð, og so er nóg mikið hjá henni við einari viðgerð, hóast allar 15 sleppa at fáa nakað av vøddamýking.

# Seinasti Royn'arin




Hvalbingar hava síðani 1923 havt Bóltfelagið Royn í bygdini, men líkt er til, at nú er farið at tynnast í flokkinum. Skeltið á Royn-høllini sigur, at nú eitur bóltfelagið Oyn, men so illa man neyvan standa til við limatalinum.

## Leyst og fast um stórt og smátt

Al Gore dálkaði ikki umhvørvið, men hann dolkaði tíðindafólkini í ryggin!
Al Gore á føroyskum= ALfrøði?

Al Gore trýr fult og fast uppá, at „Anything you say, can and will be used against you"

Bill Clinton was a WISE PRESIDENT, Al Gore was only a VICE PRESIDENT!!

Someone gets a BILL for Gore's visit!

Tinganes fer at skifta navn til WICH-SUND, tá tað fer at fløða meir.

Lyset fra OLE overstiger Torshavns MOLE

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Kjakast við seg sjálvan**
Eftir at hava kjakast í næstan tveir tímar um hansara nýstlu av umboðspeningi, avvísir Lars Løkke Rasmussen, at hann hevði ov langar fingrar, tá hann sat sum fíggjamálaráðharri
Vikublaðið

**At skapa ella loysa teir?**
Danir: Teir borgarligu bestir tá tað snýr seg um búskaparligar trupulleikar
Norðlýsið

**Wauw!**
Vitan fær okkum at síggja tað ósjónliga
Sosialurin

**Gyltar tíðir**
Grønlendskt gullnám á børsin
Vikubaðið

**Endiliga ein stuttur vetur**
Heilan vetur í fimm dagar
Sosialurin

**Bogi for President**
Bogi Hansen – betri enn Al Gore
Norðlýsið

# Tredivu krónur lógu eftir

Tað er møguligt, at hendan myndin til grein um Heimamissiónin bara skal fatast sum ein illustratión og ikki so bókstaviliga – men skuldu vit tikið tað bókstaviliga, so lógu góðar 30 krónur eftir.
Kelda: Nym.fo



**Heimamissiónin lítið yvirskot**

Ársroknskapurin hjá Heimamissiónini fyri 2007 varð leygardagin seinnapart lagdur fra á Ársmøtinum í Meiningheitshúsini í Havn, og hann vísti eitt lítið yvirsk

Les me